Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

# Kunngerð

## Um broyting av Almennu Byggisamtyktini fyri Runavíkar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Býráðið á fundi 29/11-2007 hevur samtykt at gera broytingar í býarplanunum fyri Glyvrar,Saltangará,Søldarfjørð,Skála,Oyndarfjørð og Elduvík.

**Glyvrar og Saltangará**
Broytingarnar umfata matriklarnar 125, 126a, 150a og 276a frá G1-øki , Veg-øki og G2-øki til B-øki

**Søldarfjørð**
Broytingarnar umfata matrikulin 58a frá G1-øki til B-øki

**Skála**
Broytingarnar umfata matriklarnar 320a, 352a, 353, 354 frá C2-øki til B-øki og 355 frá C2-øki til Veg-øki.
Broytingarnar umfata eisini matriklarnar 34a 122, 123a, 126a, 342, 393 og 394 frá D1-øki til B-øki og 34a, 393, og 407 frá D1-øki til Veg-øki .

**Oyndarfjørð**
Broytingarnar umfata matriklarnar 8g, 8h, 8i, 8c, 25, 67a, 148, 149, 150 og 151 frá G1-øki til B-øki.

**Elduvík**
Broytingarnar umfata matriklarnar 56, 57a, 71a, 95, 101, 102, 107, 111, 114, 117, 120, 129, 183, 185, 204, 241 og 253, frá D1-øki til F1-øki.

Eisini umfata broytingarnar matriklarnar 2a, 4a, 198 og part av litra "a" til nýtt D1-øki.

Broytingarnar er til skjals á kommunuskrivstovuni í Saltangará í upplatingartíðini í tíðarskeiðnum **9. januar til 30. januar 2008.**

**Harumframt eru:**
broytingarnar á Skála eisini til skjals í svørtutalvunum á Skála og í Skálafirði, broytingarnar í Oyndarfirði í svørtutalvu í Oyndarfirði og broytingarnar í Elduvík í svørtutalvunum í Elduvík og Funningsfirði.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi í seinasta lagi 9. apríl 2008.

*Saltangará, tann 4/1-2008*

**Runavíkar Býráð**

# Festi ynskist

Festy ynskist til keyps ella leigu av fólki, ið hevur viðkomandi útbúgving. Bæði neyta- og seyðagarður hevur áhugað.

**Bill. mrk. 110108–001**

SEV

# Vilt tú hava ávirkan á el-trygdina?

**Eitt starv sum eftirlitsfólk í Vestmannaøkinum er leyst at søkja til setan skjótast tilber.**

**Starvið**
Tú kemur at samskifta við elinnleggjarar og hava eftirlit við nýggjum elinnleggingum, umframt skráseting av hesum í Norðurstreymoy, Vágum og Suðuroy. Ein partur av arbeiðinum verur framhaldandi dagføring av 5Amper mátianleggum kring landið, og at veita tekniska kundatænastu. Eisini kemur tú at gera stakroyndir av elmálarum og umsita málaragoymsluna hjá SEV. SEV hevur økisskrivstovur í Tórshavn, Vestmanna, Skálabotni, Klaksvík og Vági.

**Førleikar**
Umsøkjarar skulu hava prógv sum elinnleggjari, maskinmeistaraútbúgving við starvsroyndum innan eløkið ella samsvarandi útbúgving.Vit vænta at tú hevur góðar førleikar innan krøv og gerð av elinnleggingum, góð evni at samskifta og samstarva og ert fyrikomandi.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum SEV og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til:

Elfelagið SEV
Postrúm 319
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er týsdagin 15. januar 2008.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Dánjal Jógvan Hansson á telefon nr. 346800.

## Frá Føroya Termovirki - FTV.

Vit skulu siga frá, at **Glas & List** er givið við innrammingarvirkseminum, og at

Spf EAG-**innramming**
**Tel 515253**
**Argjavegur 36**

hevur yvirtikið og heldur fram við sama virksemi
(fyribils er opið aftaná 17:00).

Hervið takka vit øllum okkara trúgvu viðskiftafólki ígjøgnum nógv ár og ynskja

EAG-**innramming**
bestu ynskir fyri framtíðina.

Vinarligar heilsanir og gott nýggjár
**FTV & EAG**

Viðareiðis Kommuna

FO- 750 Viðareiði · T-postur: vid.kommuna@kallnet.fo
Tel: +298 451083 · Fax: +298 451094

# Kunngerð

Sambært kunngerð nr. 109, frá 7. desember 2007 fer løgtingsval fram

**leygardagin tann 19. januar 2008**
**í Gamla skúla á Viðareiði**

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið, tann 18. jan. 2008, greiða brævatkvøðu við at venda sært til kommunuskrivstovuna. Brævatkvøður skulu verða valstýrinum í hendi innan valið byrjað kl. 10.00 tann 19. januar 2008.

**Heimaval:**
Veljarar, ið vegna sjúku ella annað ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima frá 12. jan. til og við 18. jan. 2008 við at boða frá á kommunuskrivstovuna, tlf. 451083 ella hjá valnevndarformanninu, tlf. 588052, áðrenn kl. 18.00 fríggjadagin tann 18. januar 2008.

**Valkort:**
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna og valkortini verða send út við postinum til allar veljarar, ið standa á vallistanum. Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá sum skjótast.

*Viðareiði, hin 10. januar 2008*

**Valstýrið í Viðareiðis kommunu**

## Skrivari/hjálparfólk til kommunulæknaviðtalu

Eitt starv sum hjálparfólk 3/4 ella fulla tíð er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt. Sjúkrasystir hevur fyrimun.

**Førleikar:**
- Teldukunnleika á basalum støði
- Vitan innan heilsurøkt
- Vera fyrikomandi

**Løn:**
Tosa vit um.

Freistin at søkja er úti 15. jan. 2008. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til tlf. 51 37 00. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum kunnu sendast til:

Kommunulækni
Kári Jacobsen
J. Paturssonargøta 22
100 Tórshavn